ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

11. januar 2022
Mál: 21/25847
Tygara Skriv:
Viðgjørt: HP

Nr. 52-105/2021

Svar
Uppá

§ 52a fyrispurning nr. 52-080/2021 frá Hervør Pálsdóttir, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í almannamálum Sólvit E. Nolsø, um Hagtøl um heimloysi

Fyrispurningurin ljóðar soleiðis:

1. Verður tað arbeitt við at fáa hagtøl fyri heimloysi í Føroyum?
2. Um ja, nær verða hesi væntandi klár?
3. Um ja, hvør er definitiónin upp á heimloysi í hesum arbeiðinum?
4. Er nakað arbeiði í gongd, ið skal tryggja heimleysum í Føroyum nøktandi umstøður og hjálp?

Svar
Til nr. 1, 2 og 3
Almannamálaráðið hevur, saman við Hagstovu Føroya, sett arbeiðið í gongd við innsavnan av hagtølum um heimloysi í Føroyum. Innleiðandi arbeiðið er komið væl ávegis, og Hagstovan er nú í ferð við at savna hagtøl og at skipa hagtølini. Tað er sostatt Hagstovan, ið stendur fyri pørtum av hagtølunum, og tað verður Hagstovan, ið fer at almannakunngera hagtølini.

Hagtølini verða fyriskipað eftir tí altjóða *Ethos-flokkingini*, (sum stendur fyri European Typology of Homelessness and Housing Exclusion). Allýsingin av hugtakinum "heimloysi" fevnir breitt og er býtt út á 13 flokkingar. Tað er t.d. persónar, sum búgva á gøtuni, gista á herbergum, búgva í ovfyltum bústaði, persónar, ið ikki búgva undir nøktandi umstøðum o.s.fr. Tað er ikki vanligt í øðrum londum at hava almenn hagtøl um allar 13 Ethos-flokkingarnar men at avmarka seg til tey, sum eru uttan tak yvir høvdið (roofless) og tey, sum ikki hava egnan bústað (houseless). Hetta er eisini leisturin, sum vit arbeiða eftir í Føroyum.

Í sambandi við hagtølini er tað sum nevnt Ethos-allýsingarnar, ið definera ein heimleysan. Hagtølini, sum ætlanin er at savna, fevnir um hesar Ethos-flokkingar:

1. Persónar, sum sova í almenna rúminum,
2. Persónar, sum gista á herbergum,

3. Persónar, sum búgva í búfyriskipan fyri heimleys
4. Persónar, sum búgva í kreppumiðstøðum fyri kvinnur

Føroysku hagtølini, sum Hagstovan fer at savna og skipa, eru gistingar á Herberginum, hjá Bláa Krossi, Gloria og Kvinnuhúsinum. Tað merkir, at tað eru nr. 2, 4 og lutvíst nr. 3 í yvirlitinum omanfyri. Almannamálaráðið fer at standa fyri hagtølum til nr. 1 og partar av nr. 3. Fyrireikingarnar av hagtølum, sum Almannamálaráðið fer at standa fyri, eru ikki lidnar enn.

Hagstovan væntar at fáa tey fyrstu hagtølini í januar, og fer í komandi ári at leggja nøkur fyribilshagtøl á heimasíðu teirra. At tað eru fyribilshagtøl merkir sambært Hagstovuni, at tey kunnu finnast í hagtalsgrunninum undir flokkingini "*hagtøl undir menning*". Fyri at hagtølini kunnu flokkast sum almenn hagtøl framleidd av Hagstovuni, skulu tey lúka treytir, sum Hagstovan setir til alt sítt hagtalsvirksemi. Sambært Hagstovuni væntast almenn og endalig hagtøl um heimloysi at verða tøk um umleið eitt ár.

Til nr. 4
Umframt at mangla ein bústað, hava tey heimleysu, ið verða viðgjørd í hesum svarinum, í flestu førum djúptøknar sálarligar og sosialar avbjóðingar at dragast við, sum hava við sær, at tey ikki megna at halda ein bústað. Nøkur eru í eini støðu, har tey ikki ynskja ella eru klár at taka ímóti sosialfakligari hjálp, og hjá hesum snýr tað seg um, at geva teimum so høga lívsgóðsku sum gjørligt í tí støðuni, sum tey eru í.

Umstøðurnar hjá heimleysum eru raðfestar við hægri játtanum til høvðuskontuna *Stuðul til fyriskipanir til heimleys* bæði í 2020, 2021, og játtanin er aftur hækkað í 2022. Ein partur av øktu játtanini er, tí at Frelsunarherurin í Norra stigvíst lækkar stuðulin til heimleys í Føroyum, og játtanin á løgtingsfíggjarlógini hækkar tí samsvarandi. Men høvuðsparturin av økingini er meirjáttan, sum hevur til endamáls at bøta um umstøðurnar hjá heimleysum. Talan er bæði um, at virksemið hjá Herberginum er víðkað, og umsorganarheimini hjá Bláa Krossi og Gloriu hava fingið játtan til fleiri starvsfólkatímar.

Tórhavn, 11. januar 2022

Sólvit E. Nolsø
landsstýrismaður